# Ársfrágreiðingin

Frágreiðingin farna ár bar brá av, hvussu sparingar ávirkaðu gerandisdagin í skúlanum – fyri næmingar og lærarar. Sparingarnar vóru bæði óhepnar, og sjálvandi vóru skúlastýrið, lærarar og foreldur ónøgd.

Tá eg fyrireikaði meg til í kvøld hugsaði eg: Hvat er mest umráðandi og áhugavert at draga fram og umrøða fyri foreldrunum í kvøld?

Eitt sum eg havi lært seinasta árið og sum var púra nýtt fyri mær, var at vit í Hoyvíkar Skúla hava sonevnd lesiskeið. Lesiskeiðið er ætlað næmingum frá 4. fl sum hava eyka hjálp fyri neyðini í lesing og skriving og eitt skeið varðar í 6 vikur – sera sjónligt er, hvussu næmingar taka seg fram hetta tíðarskeiðið. Gleddist almikið um hesa kunning, tí ofta haldi eg, at vit serliga fokusera upp á tað sum ikki riggar og teir manglar sum eru á økinum.

Í verandi skúlaári fingu vit tvær skúlastovur til børn við serligum tørvi. Vit hava nú lærarar sum hava nomið sær serliga vitan um børn við autismu, skúlastovur til endamálið og allatíð í samstrav við NSR tænasuna og sjálvsagt er týdningarmikið at hava foreldrini við í hesum arbeiðinum. Og sjálvandi skal tilboðið allatíðina evaluerast og mennast, men fatanin er, at tilboðið er væleydnað.

Á nógvum skúlum verður arbeitt við at bøta um samstarvið millum skúla og frítíðarskúla. Tað er at fegnast um at vit nú síggja, hvussu samstarv millum skúla og frítíðarskúla áhaldandi gerst betri og betri. Fyrimunirnir við at skúli og frítíðarskúli eru undir somu tekju eru fleiri. Eitt er at børnini ikki skulu nýta tíð til ferðing millum skúla og frítíðarskúla. Starvsfólk í skúla og frítíðarskúli hava regluligar fundir til tess at gera samstarvið støðugt betri. Ein sjálvsagdur fyrimunur er eisini, at vit í fleiri førum hava kunnað nýtt starvsfólk úr frítíðarskúlanum sum vikarar í smáu flokkunum um sjúka, skeið ella okkurt annað hevur verið. Gagnligt fyri børnini, at tað eru somu persónar sum ganga aftur, heldur ennat nýggj og ymisk andlit trína inn í flokkin hvørja ferð.

Í summar varpaði kringvarpið ljós á, at skúlar og stovnar møguliga áttu at havt eina tilbúgvingarætlan í samband við hjúnarskilna. Vit vita, at fleiri og fleiri pør velja at fara hvør til sítt og at tað ávirkar børnini. Tí valdu vit at taka evnið upp. Skúlastýrið ásannaði, at tað eru næmingar sum verða illa fyri av hjúnarskilnaði og at tað kann vera torført at finna rætta háttin ella leisitin at taka evnið upp. Á námsfrøðiligum fundi var spurningurin viðgjørdur. Niðurstøðan var at eingin tilbúgvingarætlan verður gjørd, men skúlin heitir staðiliga á foreldur um at kunna flokslæraran, um tey fara hvør til sítt. Hetta so skúlin kann taka serligt fyrilit fyri hesum næmingum. Eisini so skúlin veit, hvør hevur foreldramyndugleikan, hvønn skúlin eigur at venda sær til, hvar næmingurin býr og so framvegis.

SSP stendur fyri samstarv millum skúla, sosialar myndugleikar og politi…løgreglu. Hoyvíkar skúli er sjálvsagt við í hesum samstarvi – og tað vita tit sum hava børn í 7 og 8 flokki sjalvandi ein hóp um. Tí í farnu viku vóru evnisdagar um børn og rús har fleiri áhugaverdir fyrilestrar vóru, eisini vóru foreldarfundir fyri 7. og 8. flokkunum. Var við til ein foreldrafund um evni har bæði løgregla og alkoholráðgevi greiddu frá. Sera áhugavert. Tosa var um árinini av alkoholi, bólkapress, hvussu vit ávirka børnini, hvussu vit sum foreldur kunnu stuðla og hjálpa teimum. Avbera kveikjandi eftir mínum tykki. Tordis Fagranes var alkoholráðgevin

sum millum annað segði nakað um, hvussu vit kundu bøta um samskiftið við tannáringin. Tað bylgist so nógv í barminum á teimum, at vit foreldur ofta ikki hava ánilsi av hvørjum lag tannáringurin er í og lagið og kenslurnar skifta skjótt. Vit vita heldur ikki, hvussu tey reagera upp á tað, sum verður sagt. Fari at endurgeva eitt av gullkornum hjá Tordis:

Vit vita ongantíð veruliga hvat bylgist í tannáringinum ella hvussu tey reagera upp á tað sum verður sagt. Fyri at hjálpa teimum og okkum sjálvum, skulu vit ímynda okkum, at tey bera eitt spjaldur har tað stendur:

Stíg varliga – undir umbygging!

Annars er Malan Mohr lærari eisini í SSP samstarvinum fyri Hoyvíkar Skúla, so um onkur hevur okkurt at spyrja um, so er hon her í kvøld.

Annars vita vit øll, at ein glæsiligur skúli er latin upp á Løgmannabreyt. Væl av samstarvi er millum skúlarnar báðar í Hoyvík – sum jú er tann býlingurin í landinum sum vaksur mest. Sum nakað nýtt hava báðir skúlarnir í Hoyvík fingið framhaldsdeild – 8. og 9. flokk. Fyri at fáa fleiri og fjølbroyttari lærugreinaúrval fyri 8. floks næm verða hesar bodnar út av skúlunum báðum. Í ár eru greinarnar hesar: motorlæra, honbóltur, heimkunnleiki/ køk, týskt, aleis –evnafrøði, hondarbeiði margmiðlalæra smíð….. Frábært bæði fyri næmingar, lærarar og fíggingina at vit kunnu gera hetta saman.

Fái hug til at skoyta uppí, at motorlæran helst fer í ommu sína eftir summarsteðgin. Stórt spell, tí serliga ungu dreingirnir hava verið sera glaðir fyri motorbreytina. Ofta verður sagt at fólkaskúlin ikki reiðiliga hevur nóg nógv tilboð til dreingir, tí er sera stórt spell, um hendan breytin dettur niðurfyri... Spell at nakað sum øll eru glað fyri skal takast av tímatalvuni. Orsøkin er, at vit eingi høli hava. So um nakar tykkara veit nakað um, hvar hendan breytin kann húsast – bíliga í framtíðini, so frætta vit fegin.

Hoyvíkin vaksur alsamt – serliga barnafamiljurnar gerast fleiri og fleiri her. Mong halda kanska ikki at at so nógv er sum bindur saman umframt ansing, skúla, kirkju og samkomur. Tað var undir øllum umstøðum mín fatan sum tilflytari, tá flutti niðan í Hoyvíkina. Tó er hondbólturin eitt sum bindur børn og vaksin í Hoyvík saman. Vit hava fleiri lið og eina høll sum ætlandi verður bygd út. Stuttligt er tí eisini at skúlarnir í Hoyvík hava valt at bjóða næmingunum hondbólt sum vallærugrein í framhaldsdeildini og tann breytin tykist eisini at hava stóra undirtøku.

Eitt sum vit í skúlastýrinum fegnast almikið um er, at vit hava fingið Næmingaráð í Hoyvíkar Skúla. Eg hitti tey í farnu viku – 2 – 3 umboð úr hvørjum 8 og 9 flokki eru umboðað. Meini veruliga, at hesi ungu menniskjuni vóru avbera skilagóð og kveikjandi at tosa við. Gleðist eisini um, at tey vóru við við upp á at vit javnan fara at hittast og fundast um tað, sum vit kunnu gera enn betri og at vit kunnu taka tað til eftirtektar sum tey halda er neyðugt í einum skúla sum hevur fingið eina framhaldsdeild. Eg fekk at vita, tá eg hitti tey, at samskifti ml lærarar og framhaldsdeild avgjørt hevði havt nakrar barnasjúkur, men at tey avgjørt kendu at rødd teirra var væl sterkari og bleiv møtt og tikin í álvara, nú tey tosaðu søkina hjá framhaldsdeildini í næmingaráðnum.

Eg eri sera fegin um, at umboð fyri næmingaráðið hava játtað at siga nøkur um arbeiðið hjá Næmingaráðnum. Tey fáa orðið nú….takk fyri meg.